# Høgni spyr Bárð um skattahol

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

*- Hvussu nógv smápartafeløg og partafeløg eru farin í sjálvbodna, solventa likvidatión frá 1. januar 2004 til 1. januar 2007, og síðani 1. januar 2007?*

*- Hvussu nógv smápartafeløg og partafeløg hava niðurskrivað partapeningin í somu tíðarskeiðum?*

*- Hvussu stórar upphæddir eru farnar úr feløgunum, og hvussu nógv hevur landskassin fingið í skatti av hesum?*

*- Hevur landsstýrismaðurin gjørt nakað til tess at kanna hesi mál og at tippa møgulig hol í lógini?*

Hesar tríggjar spurningar, fær Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni Tjóðveldisfloksins á tingfundi í dag.

Høgni Hoydal vísir á, at vit í bløðunum í seinastuni hava sæð fleiri dømi um sjálvbodnar, solventar likvidatiónir av smápartafeløgum og partafeløgum.

- Samstundis eru dømi um, at nýtt felag verður stovnað við sama navni við fráboðan í sama blaði. At feløg, ið ikki eru insolvent – altso feløg við virðum – velja at fara í sjálvbodna likvidatión, kann hava skattatekniskar orsøkir. Tað kann vera ein háttur at sleppa undan at gjalda skatt av kapitalvinningi, sambært kapitalvinningsskattalógini, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir á, at sama er at siga, um feløg niðurskriva partapeningin.

- Og hetta eru júst nøkur av dømunum, ið landsstýrismaðurin varð spurdur um í skrivligum fyrispurningi fyri jól 2006, men har hann vísti øllum ivamálum frá sær, sigur Høgni Hoydal, sum tí spyr, um landsstýrismaðurin er vorðin klókari síðani og hevur gjørt nakrar kanningar og metingar um møgulig hol í kapitalvinningsskattalógini, sum mugu tippast beinanveg, um ikki landskassin skal missa stórar upphæddir.

# Gerhard vil varðveita føroyska bátin

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

*- Hevur landsstýrismaðurin nakra ætlan um at varðveita føroyska bátin?*

*- Metir landsstýrismaðurin at ein loysn kundi verið beinleiðis stuðul til føroyskt bátasmíð?*

*- Metir landsstýrismaðurin at mvg fritøka eisini kundi verið ein loysn?*

Hesar spurningar setir Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, landsstýrismanninum í Mentamálum. Løgtingsmaðurin sigur, at bátasmíð sum handverk er við at doyggja út í Føroyum. Hann sigur, at nógv verður tosað um mentan, og at nógv verður goldið, men higar tilhevur ikki nógv verið gjørt til tess at varðveita gamla føroyska bátasmíðið.

- Mær vitandi eru tveir bátasmiðir í Føroyum sum liva av sínum handverki – annar á Sandi og hin í Kollafirði. Hvussu hondverkið skal varðveitast, um eingin verður settur við, er ikki ilt at gita um, heldur Gerhard Lognberg, sum staðfestir, at tað nú er í tøkum tíma at finna eina loysn soleiðis, at aldargamla handverkið ikki fer í gloymskuna.

# Vencil annar

**Nú er næsta nummarið av Vencili komið út. Fyrsti Vencil sá dagsins ljós 23. september í fjør, og bara eitt hálvt ár seinni, er Vencil aftur á skránni. Og aftur hesa ferð er Vencil á tremur við góðum upprunaskaldskapi á føroyskum og væltýddum skaldskapi úr heimsbókmentunum**

MENTAN
*Tíðingaskriv*

Tey, ið hava skrivað upprunatilfarið í hesum næsta Vencili, eru flest ung og evnarík skøld. Onkur debuterar í Vencili. Ein teirra er Kjartan Hansen, ið hevur tvær yrkingar og eina stutt-stuttsøgu við. Katrin Reinert er onnur, sum fyrstu ferð hevur tvær yrkingar við. Síðan eru fleiri onnur við, sum hava fingið onkra yrkingina prentaða, og uppaftur onnur, sum áður hava skrivað onnur tekstsløg, men sum royna seg fyri fyrstu ferð við yrkingum. Dánial Hoydal kenna flest øll sum ein, ið dugir sera væl at týða sangleikir. Eisini hevur hann skrivað librettoina til fyrstu føroysku operuna. Her roynir hann seg við yrkingum. Marjuna S. Kjelnæs kenna flest. Hon hevur skrivað útvarpsleikir, stuttsøgur og annað, og hon roynir seg eisini á fyrsta sinni við yrkingum. Malan Poulsen hevur eina yrking við. Hana hava vit ikki hoyrt frá í longri tíð. Oddfríður Marni Rasmussen hevur eina stuttsøgu. Vónbjørt Linjonsdóttir hevur eina yrking við. Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð hevur tvær stuttsøgur við. Og so eru sjálvandi nakrir garvaðir yrkjarar við. Heðin M. Klein, Alexandur Kristiansen og Hanus Kamban hava nakrar yrkingar við. Agnar Jógvansson hevur tríggjar stuttsøgur við.




Ongin Vencil uttan týðingar, og hesa ferð eru við týðingar, ið fluttar eru yvir í føroyskt úr sponskum, enskum, týskum, russiskum. Marianna Hoydal hevur týtt søguna “Ein sera gamal maður við ovurstórum veingjum” eftir kolumbiska rithøvundin Gabriel García Márques. Eisini hevur Marianna Hoydal týtt stuttsøguna “Skriftin hjá gudunum” eftir argentinska høvundin Jorge Luis Borges.

Hugin Eide hevur týtt fýra minimalistiskar stuttsøgur eftir schweisiska prosaistin Peter Bichsel. Símun av Skarði hevur týtt eina yrking eftir týska skaldið Peter Waterhouse. Johnny Thomsen hevur týtt stuttsøguna “Skýggið, vatnið, tornið” eftir russisk-amerikanska skaldið Vladimir Nabokov. Oddfríður Marni Rasmussen hevur týtt yrkingar eftir týskaran Kurt Schwitters og amerikanararnar Denise Duhamel og Russell Edson. Í fyrsta Vencili var yrkingin “Ýl” eftir amerikanska beatskaldið Allen Ginsberg. Næsta nummar hevur so yrkingina, ið kallast “Undirgrein til Ýl”. Tað er ein av fremstu týðarum føroyinga, Gunnar Hoydal, sum týtt hevur.

Perman er aftur hesa ferð prentað á Grafiska verkstaðnum við Jan Andersson. Permuna hevur Fríða Matras Brekku gjørt og er hon hugkveikt av stuttsøguni “Skriftin hjá gudunum” eftir Jorge Luis Borges.

Vencil annar er á tremur við framúrskarandi skaldskapi. Tráðurin gjøgnum henda Vencilin er litaður við absurdum og ofta surrealistiskum tekstum, men eisini eru tekstir, sum eru í samljóði við ta modernistisku siðvenjuna.

Vencil er at fáa í bókhandlum kring landið fyri 160 krónur. Eisini ber til at tekna seg sum haldara á heimasíðuni hjá Vencili www.vencil.fo fyri bara 100 krónur pluss postgjald fyri hvørt nummarið, tá fær haldarin hetta týðandi ritið sendandi til dyrnar.

## Sputnik rísur aftur

**Leygarkvøldið 14. apríl verður Ítróttarhøllin í Trongisvági karmur um rimmar dansitiltak. Ongin mætari enn enn føroyakendu Sputnik trína aftur á pall eftir 15 ára steðg.**

Hetta er fyrstu ferð síðan 1992, at Sputnik fer á og vit kunnu vænta okkum eina sera spennandi og kensluborna framførslu. Sputnik telur hettar kvøldið uppruna manningina brøðurnir Jens & Marner Lisberg, Jens Johannesen og afturat sær hava teir Kolbein Simonsen á bassi, Arnbjørn Sivertsen á gittar, Ronnie Nielsen á trummum og Charles Gade. Allir hava gjøgnum árini verið við á framførslum og myndum hjá Sputnik.

Sputnik var sera vælumtóktur bólkur millum Føroya fólk fyri teirra slagarir. Sputnik var ein av mest spældu føroysku bólkunum í Útvarpinum upp gjøgnum 80'ini og í byrjanini av 90'unum, við eitt nú væl kendu løgunum ”vilt tú meg elska”, ”Eg sjólívið valdi” og ”Kom abbi set teg stabba á”.

Til hesa framførsluna er ein heilt serligur plátuvendari funnin fram, tað er mr. Dansband Elis Poulsen, ið fer at venda plátum og undirhalda á hansara heilt egna og fólkakæra máta.

Til yngra ættarliðið og onnur, ið eru áhugað í at vita, hvat hendir á tónleikapallinum í Suðuroy í dag, verða nýggir og forvitnisligir tónar at hoyra frá Tvørabólkinum Ablaze. Bólkurin er mannaður av ungfólki av Tvøroyri, við sera evnaríku sangarinnuni Sólfríð Bech á odda.

Strandferðslan fer sambært fyrireikarunum ætlandi at gera eitt serligt ”suðuroyarcruise hendan dagin”. Hettar skuldi gjørt at tað er upplagt hjá fólki norðanfjørðs at komið suður og upplivað eitt ektað ”suðuroyartiltak” við tónleiki og undirhaldi.

Tað er Froðbiar Sóknar Róðrarfelag og 2. A á Miðnámsskúlanum í Suðuroy, ið skipa fyri.